# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 15
Februar 2013




ISSN 1603-0036

Tríggjar frímerkjaútgávur:
- Søren A. Kierkegaard
- Europa 2013 - postbilar
- Mús og rotta

Posta
FAROE ISLANDS







FO 764 Royndarprent

# Søren A. Kierkegaard 1813 - 2013

*5. mai 2013 eru 200 ár liðin síðani heimskendi danski gudfrøðingurin og heimspekingurin Søren Aabye Kierkegaard varð borin í heim. Kierkegaard hevur eisini havt týðandi ávirkan á føroyskt trúarlív, og hava vit tí valt at hátíðarhalda hetta við eini felagsútgávu saman við Post Danmark.*

Søren Kierkegaard kendi frá uppvøkstrinum bæði kirkjuna og herrnhuttisku brøðrasamkomuna. Hóast Kierkegaard seinni í lívinum vrakaði tankan um kirkjur og samkomur kom hann at seta sjónsk spor eftir seg í føroyskari samkomusøgu í uppgerðini hjá Victori Danielsen við fólkakirkjuna.

Søren Kierkegaard gjørdi upp við niðurbundna vanahugsan í síni samtíð, samstundis sum hansara samtíð var merkt av grundleggjandi uppgerðum við hevdbundnar fatanir á so nógvum økjum, bæði politiskum, átrúnaðarligum, vísindaligum og heimspekiligum.

Kollveltandi politiskur andi floymdi yvir Evropa og Danmark gjørdist í 1849 eitt konstitutionelt monarki. Grundlógin kom ikki dettandi úr himli men var eitt úrslit av tankunum frá 1700-talinum: ein og hvør er føddur líka og føddur frælsur.

Á átrúnaðarliga pallinum vórðu kanónirnar eisini vendar móti kirkju, trúgv, Guði og bíbliu og tá ið Ludwig Feuerbach proklameraði (1841), at Guð var telgdur av menniskjanum brast ein bumba millum intellektuella týska ungdómin. George Elliot var skjótur at týða Feuerbach til enskt.

Arthur Schopenhauer skrivaði (1844), at heimurin er rikin av einum altíð ómettandi vilja, sum førir við sær at menniskjan er ein ólukkuligur, líðandi skapningur. Tann tiltakandi evropeiska individualiseringin talaði sítt greiða mál.

Nøkur ár seinni kundu danir lesa unga rithøvundan Frederik Dreier og hansara sosialistisku tankar og uppgerð við kirkjuliga konservatismu, har prestarnir vóru húðflettir í skortfleingjum, sum einki stóðu aftanfyri sarkasmuna hjá Kierkegaard í hansara uppgerð við kirkju og statsautoriseraða prestaveldið. Ein gjøgnumgongd av verkunum hjá Kierkegaard er ein ferð gjøgnum evropeiska andssøgu, ein ferð, sum eisini spinnur træðrir fram í tíðina til nútímans eksistentialismu.

Ein av grundtankunum hjá Kierkegaard er, at menniskjan er ein einari, eitt individ, sum skal slíta seg frá teirri býttu, navnleysu mongdini. Hann hevði andstygd fyri epigonum, borgarum, sum eftirapa orð og gerningar hjá øðrum.

Tá ið Kierkegaard doyði í 1855, 42 ára gamal, útlúgvaður av polimikki og krevjandi, mentalum arbeiði, hevði hann rópað, so tað hoyrdist tvørtur um landamørk, at tað nyttar ikki at krógva seg aftanfyri eina masku ella at fjala seg aftanfyri eina bíbilska trúgv ella eina autoriseraða guðstrúgv og fínar titlar og bispakápur, tí at viðurskiftini við Guð er ein søk millum tann einstaka og Várharra.

Kierkegaard, sum fyrr í lívinum var trúgvur kirkjugangari og eisini plagdi at ganga og á møti hjá herrnhuttisku brøðrasamkomuni endaði við at vraka tankan um kristnar samkomur.



Standmynd av S. A. Kierkegaard
Mynd: Scanpix

Í seinna helmingi av 18-talinum hendu stórar samfelagsligar broytingar í Føroyum. Fríhandil og fiskiídnaður komu í staðin fyri einahandil, bónda- og stættarsamfelagið, men fólkakirkjan var framvegis mest sum einaráðandi. Tó var ein ávísur røringur komin í , eitt nú kom skotin William Sloan til Føroyar sum evangelistur í 1865. Boðskapurin hjá Sloan var einfaldur og beint fram: Eingin frelsa uttan eina persónliga trúgv á Jesus Kristus.

Nøkur ár fyri aldarskiftið kom danska heimamissiónin til Føroyar. Heimamissiónin vildi endurkristna nútímans, verðsliga samfelagið. Uppgávan hjá heimamissiónini var sostatt at reformera kirkjuna,

Sostatt var eitt ávíst grundarlag lagt undir mentanarkritikk og ein kritikk av kirkjuni í Føroyum.

Tað gingu rúm ár eftir deyða Kierkegaards at han vakti nakran ans í Føroyum. Og tá ið tað loksins hendi var tað ikki sum heimspekingur, men sum kirkjukritikari. Hetta hendi umvegis Victor Danielsen, sum árini 1911-1914 gekk á læraraskúla í Havn, og sum á heystið 1913 kom í stóra sálarkreppu í søkjan eftir Guði.

Victor Danielsen søkti sær eisini sálarhjálp í heimamissiónini, men skjótt gjørdist honum greitt, at kirkjan kundi ikki reformerast, men mátti vrakast, tí at kirkjan og prestarnir ikki bara liva í lívslygnini, men eisini av henni, tí at teir liva ikki av andanum, men av almennari løn frá ríkinum.

Àrini 1914 -16 skrivar Victor Danielsen nógv lesararabrøv í føroysku bløðunum, har hann jarðleggur kirkjuna og mentanina, sum hann metir vera glataða og elva til glatan vegna kirkjunnar oyðandi rotinskap í eini misskiltari fatan av, at talan er um eina kristna mentan. Victor Danielsen hevur ein hvassan, beinraknan penn. "Kirkjustormurin" hjá Kierkegaard sæst sjónliga aftur í lesarabrøvunum hjá Victori, og ofta er talan um nærum beinleiðis avskrift bæði í orðum og innihaldi.

Victor Danielsen tók avleiðingarnar av síni niðurstøðu og noktaði fyri at gerast virkin sum lærari, tí hann vildi ikki undirvísa sambært kirkjunnar luthersku læru. Victor Danielsen kundi ikki góðtaka barnadópin, sum hann metti vera óbíbilskan og tí ikki galdandi, og í 1916 lat hann seg doypa og gjørdist andaligur leiðari í brøðrasamkomuni, umframt at hann var sera virkin sum bíbliutýðari, sang- og sálmaskald og rithøvundur.

*Ólavur Rasmussen*

# Europa 2013 - postbilar







FO 765-766 Royndarprent

## Japanarin, sum tænti Postverkinum væl

Tað margháttliga er, at tann sum skrivar hesar reglur er javnaldri við ein japanara, sum tænti Postverki Føroya væl gjøgnum mong ár. Japanarin vit her umrøða eitur “Suzuki”. Hvørt mansbarn, sum bert hevur ein lítlan kunnleika um akfør veit, at Suzuki er ein japonsk bilverksmiðja. Suzuki-verksmiðjan framleiddi bilar longu í 1937, men tað var í føðiári mínum, í 1968, at Suzuki fór í gongd við at framleiða akfarið, sum umframt at hava stóran týdning fyri bilførarar kring allan heimin, eisini kom at hava stóran týdning fyri Postverk Føroya.

Ì 1968 framleiddi Suzuki nevniliga tann fyrsta jeepin. Tann fyrsti jeepurin hjá Suzuki nevndist “Suzuki Jimny”. Jimny-modellið varð eisini fram-leitt í 1970-árunum . Ì 1982 kom tað næsta ættarliðið av Suzuki jeepum, SJ 410 og í 1983 kom modellið, sum nevndist SJ 413. Tað var tó modellið, sum Suzuki byrjaði at framleiða í 1985, sum veruliga kom at síggjast aftur í tí føroyska landslagnum. Ikki minst tí Sverri Viderø, táverandi flutningsleiðari hjá Postverki Føroya tók avgerð um, at “Suzuki Samurai” skuldi verða álitið hjá postboðunum, ið ikki høvdu klongrutir ella knal-lertrutur.

Tá á døgum vóru tað serliga landpostboð, sum av somu givnu orsøkum, sum í dag høvdu bilar til sín postflutning. Tær ytru og meira fjarskotnu postruturnar í Havn, og í Hoyvík vóru eisini sonevndar “bilrutur”. Knallertruturnar litu mest á Puch Maxi knallertirnar, sum á sinni vóru fram-leiddar í Eysturríki. Framleiðslan av Puch Maxi steðgaði tíverri í 1990-unum. Puch Maxi varð ein álítandi knallert. Ikki bar til at koyra við rasaraferð við einari Puch Maxi. Knallertin greiddi kortini sín gerning, og við manuellum geari var so mangan læftari at standa seg í hálkuni, enn við automa-tiska gearinum, sum teir italsku Scarabeo sku-tararnir, sum komu seinast í 1990-unum høvdu. Teir italsku skutararnir koyrdu skjótari enn tær eysturríksku malurtirnar, men stóðu seg væl verri í hálkuni.

Nakrar gongurutur vóru eisini kring landið. Ì Klaksvík vóru tær flestu ruturnar gongurutur. Ì Havnini vóru tað ruturnar, sum lógu nærmast posthúsinum á Vaglinum í miðbýnum, sum vóru gongurutur. Onkur gonguruta var á bygd. Tann mest kenda man óivað verða postfarleiðin millum Bø og Gásadal, har postboðið tríggjar ferðir um vikuna gekk uppum fjallið við postinum.

Herviligu ódnirnar, sum leikaðu veturin 1988-1989 gjørdu sítt til, at nakrar knallertrutur gjør-dust bilrutur. Marknagilsrutan í Havn varð av fyrstan tíð ein knallertruta, men tá Postverkið hevði mist tvær Puch Maxi knallertir á Markna-gilsrutuni, sum vóru tiknar av tí nógva vindinum, veturin 1988-1989, varð hildið, at nú varð tíðin búgvin at gera Marknagilsrutina til eina bilrutu.

Tað var júst á Marknagilsrutini, at eg kom at koyra eina bilrutu á fyrsta sinni. Suzuki jeeparnir høvdu góð radiotól, og ein klaksvíkskona, sum enn býr á Marknagilsvegnum helt fyri fyrstu ferð eg kom í túni hjá teimum við postjeepinum :  “Hetta er sum tá ísbílurin koyrir runt at selja ís á hásumri í Dan-mark, teir hava eisini tónleikin for frá”, segði hon



Heri Simonsen og Suzuki-jeepurin
Mynd: Heri Simonsen

við einum skeivum smíli. Ein lítil áminning um ikki at vekja tann lítla, sum lá í barnavogninum uttanfyri.

Á kendu netslóðini "YouTube" finst ein slóð við einum fyrrverandi landpostboði, sum nú er kendur í øðrum høpi í Føroyum. Til árligu veitsluna hjá ítróttarfelagnum í Oyndarfirði varð á sinni víst ein "loynimynd" – ella "skjult kamera", sum danir nevna tað. À slóðini http://www.youtube.com/all_comments?v=IqM8iyj8bZI sæst tað óttafulla landpostboðið, sum kemur út úr einum húsi í Oyndarfirði, aftaná enn ein góðan kaffimunn á tí tiltikna køksborðinum. Komin út á vegin gerst tað honum greitt, at Suzuki postjeepurin er stolin. Tó gongur bert ein lítil løta, so kemur ein oyndfirðingur aftur við jeepinum. Klippið er lagt út á YouTube, sum ein tøkk fyri trúgva tænastu viðkomandi landpostboð veitti í Oyndarfirði gjøgnum 30 ár.

Sama landpostboð fekk einaferð átalu fyri at hava brúkt postjeepin til at koyra oman til Glyvra Kirkju, fyri at kunna møta til eina guðstænastu í góðari tíð. Tá vardi hann seg við, at ein tænastubilur kundi væl hóskandi eisini brúkast til guðstænastur. Tann, ið bar fram átaluna varð tó ikki nøgdur við ta umberingina.

Eitt annað landpostboð í Suðurstreymoy upplivdi á sinni, tá hann trein úr postjeepinum, at ein hundur leyp á hann og beit hann í lærið. Tann gamla kvinnan, sum átti hundin varð ógvuliga sorgarbundin, og sigur við landpostboðið, sum hon annars helt nógv av: "Eg eri so ólukkuliga hørm um hetta. Hundurin er átta ár, og hann hevur ongantíð fyrr bitið nakran". Landpostboðið tugdi eitt sindur, og svaraði: "Hvat so? Eg eri 46 ár, og eg havi heldur ikki bitið nakran".

Seinni eru onnur modell av Suzuki framleidd, men minnini um tað lítla "Suzuki Samurai" modellið, sum varð framleitt á fyrsta sinni í 1985 eru okkum serliga kær, sum starvaðust í Postverki Føroya á sinni.

*Heri Simonsen*

*Evnið fyri ársins Europa-frímerki er núverandi postbilar, so teir báðir bilarnir, sum verða vístir á frímerkjunum eru tveir bilar, sum Posta brúkar í dag. Tað snýr seg um ávíkavist ein FIAT DUBLÓ MAX fra 2012 (FO 765) og ein Scania R420 frá 2007 (FO 766)*







Royndarprent

# Rotta og mús

**Brún rotta**

*Rattus norvegicus*

Brúna rottan er størri enn tann svarta, og kallrottan er størri enn kvennrottan. Hon vigar 200-400 g, kroppurin verður 21-29 cm langur og halin 17-23 cm langur, í halanum eru 160-190 ringar. Feldurin er javnt grámorreyður, og hon er ljósari undir búkinum. Brúna rottan er førlig, snáðin er kýpin, og eyguni smá. Oyruni eru loðin og stutt og røkka tey ikki niður á eyguni, verða tey løgd fram á pannuna.

Brúna rottan verður eisini nevnd ferðarottan. Hon hevur sín uppruna í Ásia og í Kina og kom til meginpartin í Evropa í 1727, tá ið hon í murlutali svam tvørtur um Volga. Men til Danmarkar kom hon longu í 1716, tá ið Pætur Mikli keisari var og vitjaði, hann kom sjóvegis til Keypmannahavnar. Haðani var høgligt hjá henni at sleppa norðureftir, til Noregs, Føroya, Íslands og Grønlands. Rottan kom til Føroya við einum norskum skipi úr Tróndheimi, ið nevndist Kongen af Preussen. Skipið var á veg til Dublin, tá tað gjørdist vrak á oynni Lewis í Skotlandi. Vrakið rak norðureftir og kom inn á Hvalba í mai 1768. Við hesum vrakinum komu tær fyrstu rotturnar til Føroya, og longu í 1769 var hon komin til Havnar. Brúna rottan er bara í teimum stóru oyggjunum.

Rottan heldur til allastaðni, við hús eins væl og burtur frá húsum, um nóg nógv føði er at fáa. Hon etur alt og aftrast ikki við at taka mýs, egg og ungar, haruungar og ræ. Ofta hevur rottan ávís pláss, har hon etur, og tá ríviligt er, kann hon goyma sær niðurfyri.

Rottan er náttardjór burturav. Hon er ferm at klintrast og reika um allastaðni, har bygt er. Hon kann eisini leggjast í fuglabjørg, ikki minst í lundalondini, og har skrápur og drunnhvíti eiga, kann hon oyða alt. Hon heldur seg á ávísum økjum í búflokkum, sum kallrotta við fleiri kvennrottum og ungum teirra stendur fyri.

Kvennrottan gongur kviðin í 22 dagar, og hon leggur 3-5 ferðir um árið 6-12 ungar hvørja ferð. Nýlagdir eru teir naknir og blindir, og tríggjar mánaðir gamlir eru teir kynsbúnir. Ofta eru fleiri legur í sama rottureiðrið, soleiðis eru fleiri rottur um somu holu. Livialdurin hjá rottu er vanliga 1½ ár.

Allastaðni hevur verið roynt at avoyða rottu, tí at hon kann spjaða sjúku millum fólk og húsdjór. Hon gnagar allastaðni, og er hon til miklan ampa. Í Føroyum hevur hon nærum forkomið einstøkum bjargafuglum. Er rotta í oynni, eru t.d. lundi og skrápur at kalla burtur. Føroysku kommunurnar hava lógir at ganga eftir, tá tær royna at týna rottuna.

**Vestanmús**

*Mus domesticus*

Mús er grá-grámorreyð og ljós undir búkinum. Kroppurin er 7,5-10,3 cm langur, halin 7,2-10,2 cm langur, mús vigar 12-28 g.



Svartar rottur
Tekning: Edward Fuglø

Eyðkendur roykur gongur av henni. Hesin roykur kann siga frá, at hon er til staðar. Roykurin stendst av, at hon merkir økið hjá sær við landi.

Músin kemur upprunaliga úr Ásia, og fólk hava drigið hana við sær vestureftir. Músin í Føroyum hoyrir til slagið Vestanmús (Mus domesticus), ið eisini er í Írlandi, Skotlandi, Onglandi, Fraklandi, Italia, Spania og Grikkalandi. Tann føroyska músin má tí vera komin henda vegin við teimum írsku munkunum. Í Føroyum er músin ikki nevnd í skrivum fyrr enn í 1592, men músin má longu hava verið búføst í Føroyum, tá landnámsmenninir komu til Føroya á veg til Íslands og Grønlands.

Í Norðurhøvum er músin týðiliga knýtt at fólki; um summarið heldur hon til uttandura, men kemur tó aftur til hús um heystið. Í Føroyum er hon bara á nøkrum oyggjum og hon heldur eisini til í óbygdum, og um summarið legst hon í fuglabjørgini á oyggjum, har rottan ikki er.

Músin er ikki kræsin, men tekur tað, hon finnur, fræ, smákykt og mat, fólk hevur sær niðurfyri, og leivdir. Kortini dámar henni best fræ, serliga korn og alt sovorðið, sum er burtur úr korni. Hon megnar at liva, hóast hon fær ikki vatn, og tí trívst hon væl í korngoymslum. Í húsum kann hon gera skaða á bæði mat og innbúgv, tí dugnalig er hon at gnaga.

Mús klintrast um alt húsið. Er nóg mikið av føði og tilfari at byggja reiður við, standa tær seg væl í frosti. Músin leggur sær niðurfyri til verri tíðir, tá ið ov lítið er til av føði. Mýsnar eru í búflokki, kvennmúsin byggir reiður, kallmúsin kemur í reiðrið í makingartíðini.

Mús leggur alt árið, og hugsandi kann hon fáa undan 10 legur um árið, 3-6 mýslingar í hvørjari, um nóg rúmligt er, og føðin ikki trýtur. Mýslingarnir sjálvir eru kynsliga búnir, tá teir eru mánað gamlir.

Allastaðni, har hon er til ampa fyri fólk, verður roynt at avoyða músina við fellum ella við eitri.

*Úr bókini "Villini Súgdjór í Útnorðri" eftir Dorete Bloch og Edward Fuglø (1999).*

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 4. mars og 29. apríl 2013




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Søren Aabye Kierkegaard** |
| Útgávudagur: | 04.03.2013 |
| Virði: | 1 x 35,00 kr. |
| Nummur: | FO 764 |
| Frímerkjastødd: | 31,25 x 35,50 mm |
| Tekningar: | N. Chr. Kierkegaard |
| Gravering: | B. Skov Jørgensen |
| Prenthháttur: | Offsett / stálprent |
| Prentsmiðja: | Posten Frimärken, Svøríki |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv innanoyggja, 251 - 500 gr |







* hesi frímerki eru eisini givin út í sjálvklistrandi hefti við átta frímerkjum

Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2013 - postbilar** |
| Útgávudagur: | 29.04.2013 |
| Virði: | 7,00 og 12,50 kr. |
| Nummur: | FO 765 -766 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 40 mm |
| Myndir: | Fotostudio |
| Prenthháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | OesD, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til Evropa 0-50 g |







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Rotta og mús** |
| Útgávudagur: | 29.04.2013 |
| Virði: | 11,00 og 12,50 kr. |
| Nummur: | FO 767-768 |
| Frímerkjastødd: | 42 x 28 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prenthháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv innanoyggja 0-50 g og smábrøv til Evropa 0-50 g |

Framsíðumynd: Fotostudio
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo